LANDSVERK

Tórshavn 19. mai 2022

VENJINGARSKÚLIN, ÍLØGUÆTLAN

Viðvíkjandi ætlan fyri umvæling av Venjingarskúlanum, Frælsi 20 og flyting av tveimum deildum hjá Fróðskaparsetrinum úr Sjóvinnuhúsinum til Venjingarskúlan.

Flyting í stigum
Kampusbólkurin hevur áður mælt til at flyting av virksemi hjá Setrinum úr Sjóvinnuhúsinum, má gerðast í stigum. Mett verður at flytingin kann verða framd stigvíst frá 2022 til endaliga útflyting í 2024.
Flytingin verður gjørd í samráð við leiðslurnar á báðum deildunum.

Íløguætlan
Ein fyritreyt fyri at ein flyting letur seg gera er, at nøktandi peningur og tíð verður sett av til umvæling av Venjingarskúlanum.
Landsverk hevur vegna Kampusbólkin, gjørt uppskot til eina íløguætlan. Í viðhefta skjali er tilskilað hvussu stórar upphæddir skulu játtast, nær játtanirnar skulu falla og í hvørjari raðfylgju lonirnar verða umvældar.

Lonirnar verða umvældar í hesi raðfylgju:
2022: Lon 4 og 7, løtt umvæling og Lon 5, høvuðsumvæling - 10 mió.
2023: Lon 5 framhald og Lon 10g 6, høvuðsumvæling - 24 mió.
2024: Lon 6 framhald og Lon 2 og 3, høvuðsumvæling - 24 mió.
2025-2028: Lon 3 framhald og Lon 4, 7, 8 og 9, høvuðsumvæling liðuggerð - 86 mió.

Átøk, løtt umvæling
Fyri at nøkta einum bráfeingistørvi verður skotið upp at gera nakrar stovur í Lon 4 og 7, klárar at taka ímóti lesandi longu á heysti 2022.
Løtt umvælingarátøk:
1. Ein ætlan fyri arbeiðið skal gerast, nøgdarlistar og tilboðsinnheinting.
2. Innveggir verða málaðir.
3. Har gólvini eru illa farin, verða tey bøtt.
4. Ljósmátingar verða gjørdar í øllum stovum og supplerandi ljósarmatur verða sett upp har tað verður mett neyðugt.

Átøk, høvuðsumvæling
At bygningurin verður høvuðsumvældur merkir at
1. Allir bygningslutir frá lendisgólvi til tak, verða eftirhugdir og umvældir.
2. Klimaskermur, tað er tak og framsíðir, skal verða tættur og dagførdur eftir dagsins orkukrøvum.
3. Nýggj ventilatión verður sett upp.
4. Bygningurin verður dagførdur í mun til galdandi brunakrøv.

Trivnaðarátøk

Venjingarskúlin verður útbygdur tá ein ætlan er gjørd fyri útbygging av skúlanum. Tá hetta ikki liggur fyrst fyri í Kampusætlanini, skal roknast við at tey lesandi koma at húsast í Venjingarskúlanum tey næstu 10 árini, við verandi hølisinnrætting. Verandi umstøður hjá teim lesandi eru ikki nøktandi. Tískil mugu gerast innrættingar, sum gera tað møguligt og eisini meiri stimbrandi hjá teim lesandi at vera í skúlanum og arbeiða, eisini tá undirvísing ikki er. Hetta skapar eitt meiri áhugavert lestrarumhvørvi, styrkir tilknýtið hjá teim lesandi til Setrið og bøtir um trivnaðin millum tey lesandi. Somuleiðis verður neyðugt at skapa eitt arbeiðsumhvørvi fyri starvsfólkini, sum bøtir um møguleikarnar fyri bæði hugsavnan og felagstiltøkum.

Uppskot til mannagongdir eru:

- At ein stýrisbólkur við umboðum frá Fróðskaparsetrinum, Landsverki og Mentamálaráðnum á hvørjum ári ger eina raðfesting av, hvat skal verða gjørt í árinum, og fylgir hesum upp, so tað verður gjørt.
- At umvælingararbeiðið fevnir um bæði lætta, bráfeingis umvæling og stigvísa høvuðsumvæling av lonunum, í samsvari við játtanirnar.
- At skúlastovur í Lon 4 og 7 verða gjørdar klárar til at taka ímóti lesandi heystið 2022. Hugsað verður í fyrstu syftu um lættari umvæling, so sum at mála veggir og møguliga at supplera við ljósarmaturum.
- At átøk verða gjørd fyri at betra um trivnaðin hjá teim lesandi. Her meinast við nýggjar innrættingar, sum eggja teim lesandi til at brúka Setrið til fyrireiking bæði einsæris og í bólkum, eisini at hølini gerast meiri tíðarhóskandi til ymisk tiltøk, bæði sosial- og faklig felagstiltøk.
- At Í fyrstu atløgu verður ikki møguligt at fáa til vega einkult-skrivstovur til øll starvsfólk, sum stórt ynski er um; men, at dentur verður lagdur á góðar umstøður hjá starvsfólkum/vísindafólkum til fyrireiking.
- At parkeringsviðurskiftini verða betrað, við fyribils parkering á vøllinum.
- At kampusarbeiðið heldur fram við arkitektakapping um høvuðsbygningin, deildarbygningar og yvirskipaða ætlan fyri alt økið.
- At arbeitt verður við fyribils nýtslu og langtíðarbroytingum av Venjingarskúlanum.
- At Fróðskaparsetrið framhaldandi ger brúk av Kongshøll til felagstiltøk, inntil nýggja felagshøllin verður tøk.
- At Fróðskaparsetrið framhaldandi ger brúk av hølunum í Nóatúni.

Vegna Kampusbólkin

Bárður í Baianstovu
Verkætlanarleiðari